# 1. Skipan á arbeiðsplássinum.

## 1.1 Presentatión av arbeiðsplássinum:

Kirurgisk deild A er ein av tveimum seingjadeildum á Klaksvíkar Sjúkrahúsið.

## 1.2 Deildarslag:

Deild A er ein blanda kirurgisk seingardeild, við ortopædkirurgi sum sergrein. Tikið verður ímóti bæði innkallaðum og akuttum sjúklingum.

Innkallaðir sjúklingar fáa til dømis gjørt:

- knæ- ella mjadnaalloplastik
- arthroscopi av knæ-, fót- ella akslaliði
- osteotomiir
- arthrodesir av hond- og fótliði
- akslaskurðviðgerðir
- aðrar smærri skurðviðgerðir
- varicer
- hernia
- hæmorroidir
- ymiskar diagnostiskar scoopiir og viðgerðir

Akuttir sjúklingar kunnu til dømis hava sjúkuavgerðir sum:

- ymiskir frakturar
- amputatiónir
- muskil- og seneskaðar
- commotio cerebri
- uppreinsan av kroniskum sárum t.d.ulcus cruris
- stomiir
- akut abdomen
- ab-imminens

Harafturat verður tikið ímóti føðikvinnum.

Aldurin á sjúklingunum kann verða frá 0 – 100 ár, og innleggingartíðin er frá 1 degi til fleiri vikur.

## 1.3 Fysiskir karmar:

Deildin hevur 22 seingjarpláss:

1 einastova
3 tveysongstovur
3 fýrasongstovur
1 trýsongstova til føðikvinnur
1 barnastova til røkt av nýføðingum

Deildin liggur á 2. hædd á sjúkrahúsinum. Hon er í góðum standi og hevur sera góð hølisviðurskifti. Seingjarstovurnar er ljósar og rúmligar. Ilt og súgv er á 6 stovum. Á stovuni til føðikvinnur er wc og bað. Barnastovan hevur allar hentleikar til røkt av nýføðingum, á stovuni er Seccersborð við ilt og súgv.
Tað eru tvær uppihaldstovur til sjúklingar, við sjónvarp og parabol. Eisini eru tvey sjónvørp og video til seingjarstovurnar.
Starvsfólkið hevur góða kaffistovu og vaktarrúm. Harafturat er eitt gott samtalu/ kanningarrúm.

Føðistovan, sum er væl innrætta  er á somu hædd sum deildin. Hon er partur av deildini, við at sjúkrarøktarfrøðingarnir hjálpa til við barnsburðum, og hava ábyrgd av røktina av børnum og barnakonum.

Mitt á deildini liggur viðrakningarstova, ið verður ansa av sjúkrarøktarfrøðingum á deildini. Stovan er innrætta til endamálið, fyri umleið 6. árum síðan, við øllum nýmótans amboðum. Har er pláss til 3 sjúklingar, og verður eisini tikið ímóti ambulantun sjúlkingum til observatión aftaná doyving. Harafturat verður stovan brúkt til móttøku av akuttum sjúklingum.

Móttøkan av innkallaðum sjúklingum fer fram í serligum hølum í gøtuhæddini á sjúkrahúsinum. Sjúkrarøktarfrøðingur av deildini tekur ímóti sjúklingunum,og syrgir fyri at innleggingarpappír eru í lagi og at ymiskar preoperativar royndir og kanningar vera gjørdar. Hølini eru sera góð við tilhoyrandi kanningarrúmi, og liggja tey beint við rannsøknarstovuna.

## 1.4 Sjúklingaslag

Sí punkt 1.2.

## 1.5 Starvsfólkasamanseting:

Á deildini arbeiða sjúkrarøktarfrøðingar, heilsuatstøðarar, sjúkrahjálparar og reingeringsfólk.

Í dagvakt eru vanliga 7 røktarstarvsfólk til arbeiðis umframt deildarleiðarin.

Mánadag og mikudag er 1 sjúkrarøktarfrøðingur og tekur ímóti innkallaðum sjúklingum. Týsdag og hósdag er ein sjúkrarøktarfrøðingur í viðrakning.

Í kvøldvakt arbeiða 3 fólk, 2 sjúkrarøktarfrøðingar og 1 heilsuatstøðari/ sjúkrahjálpari.

Í náttarvakt arbeiða 2 fólk, 1 sjúkrarøktarfrøðingur og 1 heilsuatstøðari/ sjúkrahjálpari.

Á deildini er góð blanding av nýliga útbúnum sjúkrarøktafrøðingum og sjúkrarøktarfrøðingum við hollum royndum. Sjúkrarøktarfrøðingarnir á deildini hava luttikið á ymiskum styttri og longri skeiðum innan ortopædkirurgiska sjúkrarøkt, sárrøkt, stomirøkt, vegleiðaraskeiðum. Tvær sjúkrasystur hava 7 vikur vegleiðaraútbúgving. Harafturat hava 3 sjúkrarøktarfrøðingar eftirútbúgvingar-skeið. Ein sjúkrarøktarfrøðingur hevur serligan áhuga og kunnleika til sárrøkt, og hevur hon luttikið á fleiri skeiðum um evni.

Heilsuatstøðarnir og sjúkrahjálparnir hava fleiri árs royndir á deildini.

## 1.6 Røktarskipan:

Arbeiðshátturin í dagvaktunum er bólkarøkt. Deildin verður vanliga býtt í 2 bólkar við 1 bólkaleiðara og 2 bólkalimum í hvørjum bólki.
Fyri at hava kontinunitet í røktini, eru bólkaleiðarnir til arbeiðis frá mánadag til fríggjadag.
Miða verður ímóti at geva individuella røkt, og verður starvsfólkabýti eftir hvussu røktartyngdin er.
Í kvøld- og náttarvakt verður bólkarøkt ikki brúkt, tí tað eru bara ávikavist 3 og 2 fólk til arbeiðis.

## 1.7 Kommunikatión:

Vit royna at hava eitt opið og líkaverdugt samstarv við sjúklingar og teirra avvarandi, og at informatiónin skal verða á høgum støði.

Starvsfólkið á deildini, írokna lesandi, hava tagnarskyldu. Eisini yvir fyri avvarandi í tann mun sjúklingurin ynskir tað.

Starvsfólkið tiltalar hvønn annan við fornavnið. Hetta er eisini mest vanligi tiltaluformur til sjúklingar, um viðkomandi ikki hevur serligt ynski um annað.

Starvsfólk og lesandi skulu bera skelti, har navn og starvsheiti er tilskila.

Sjúkrarøktarkardex er okkara arbeiðsamboð til at tryggja framhald í røktini og til at dokumentera ta givnu røktina. Um vaktarskiftini er harafturat sett tíð av til munnliga rapport.

Hvørja viku verður gjørt skema yvir hvør er bólkaleiðari og hvørji starvsfólk eru í hvørjum bólkinum.

Medisin verður helt upp í doseringseskir til 1.døgn ísenn. Sjúklingarnir umsita hetta sjálvir, í tann mun teir eru førir fyri tí.

## 1.8 Samstarvsrelatiónir:

Vit arbeiða í tøttum samstarvi við læknar, anæstesi- og skurðdeild og ljósmøður. Eisini er tætt samstarv við fysioterapeutar, portørar, læknaskrivarar, laborantar, røntgendeild, køk, vaskarí og medisinska seingjardeild.

Eina ferð um vikuna er fundur millum sjúkrarøktarfrøðingar, fysioterapeutar og læknar, har tosa verður um teir sjúklingar vit røkta í felag.

Í samband við at sjúklingar verða innlagdir til at fáa lið útskiftan, er møguleiki at lata blóð til autotransfusión. Rannsøknarstovan umsitur beindonorbanka, har caput á femur verður goymt. Í samband við hetta samskipar sjúkrarøktar-frøðingur av deildini, í tøttum samstarvi við lækna og laborantar ambulanta móttøku. Tá verður eisini støða tikin til um sjúklingurin vil verða, ella er egnaður at vera beindonor.

Eisini er samstarv við heilsusystir, heimarøktina og deildir á Landsjúkrahúsinum.

# 2. Sjúkrarøktarfaklig viðurskifti á kliniska praktikstaðnum.

## 2.1 Virðisgrundarlagið hjá sjúkrarøktini á sjúkrahúsinum:

Málini byggja á ta menniskjaáskoðan lýst er í málum fyri heilsu- og sjúkrarøkt í Føroyum, sum er:

- menniskja verður fatað sum ein heild
- menniskjan er sjálvstøðug
- menniskjan hevur ábyrgd fyri og ávirkan á egnu heilsustøðu

- menniskjan hevur orku til at viðvirka til loysn av egnum trupuleikum

Málið fyri sjúkrarøktina á Klaksvíkar Sjúkrahúsi:

- at sjúklingunum verður tryggjað best møguligt heilsustøði
- at doyggjandi sjúklingum og avvarandi teirra verður givið eitt umhvørvið sum er trygt, siðiligt og virðiligt.

Treytirnar fyri at náa málið eru:

- at sjúkrarøktin verður framd í samstarvi við sjúkling/ avvarðandi soleiðis at persónleikin og lívsáskoðanin hjá tí einstaka verða vird
- at sjúkrarøktin verður ment og framd samsvarandi royndum av nýggjari vitan bæði vísundaliga og samfelagsliga
- At sjúkrarøktarstarvsfólkið:
- nýtir sjúkrarøktarprosessina
- í røktini byggir á resourcir/ tørv hjá sjúklingi/ avvarandi
- viðvirkar til gott samstarv við allar partar á deildini –
- á sjúkrahúsinum – og uttan fyri sjúkrahúsið
- viðvirkar til at skapa eitt trygt og virðiligt umhvørvi fyri sjúklingar, avvarandi og starvsfólk
- heldur vitan sína viðlíka, soleiðis at fullgóð sjúkrarøkt altíð verður framd
- fylgir menningini av sjúkrarøktini soleiðis at røktin altíð kann verða framd samsvarandi tí menning og broyting, sum fer fram í samfelagnum
- nýtir tað tilfeingi, ið til eina og hvørja tíð er tøkt, á skilagóðan hátt
- viðvirkar til støðuga menning av sjúkrarøktini

## 2.2 Mál fyri sjúkrarøktina á kliniska praktikstaðnum:

Málið fyri deild A er at geva best møguliga viðgerð og røkt. At tryggja at sjúklingurin kennir seg tryggan við tað kunning hann fær, at sjúklingurin verður tikin við í avgerðum, at sjúklingsins upplivilsi av støðuni verður virt og at framhald er í røktini.

Okkara besta tilfeingi er starvsfólki. Vit hava álit á at hvør einstakur er tilvitandi um sína ábyrgd og er førur fyri at umsita hana, í einstøkum støðum eins og viðvíkjandi heildini.

## 2.3 Sjúkrarøktarfaklig menningarøki á kliniska praktikstaðnum.

Tað eru nýliga gjørdar skrivligar mannagongdir fyri tær mest vanligu skurðviðgerðir og kanningar, ið fara fram á deildini. Hetta arbeiði heldur áfram.

Deildin hevur gjørt serstakt kardex til barnakonur og standard til sjúklingar ið fáa gjørt arthroscoopi.Eisini er ætlanin at taka annað kardex í nýtslu til serliga røktarkrevjandi sjúklingar.

Áhugin millum starvsfólki á deildini er stórur fyri at endurskoða og fáa til vega nýggja vitan um ymiskt vit møta í gerandisdegnum. Ætlan er at skipa okkum í smáar áhugabólkar.

Nakrar sjúkrasystrar eru í refleksiónsbólki. Hetta er nýtt fyri tær flestu, men læruríkt og spennandi og kann vera til gagn fyri tey lesandi á deildini.

## 2.4 Lýsing av sjúkrarøktaruppgávum, sum eru eyðkendar fyri kliniska praktikstaðið:

Treyta av hvar í útbúgvingini tann lesandi er, er møguleiki fyri at læra:

- grundleggjandi sjúkrarøkt
- observatión
- fyribyrging av songarlegukomplikatiónum
- upptrening
- vegleiðing
- pre- og post operativa sjúkrarøkt
- dokumentatión av sjúkrarøktini
- akut sjúkrarøkt
- røkt av cancer sjúklingum
- terminal sjúkrarøkt
- medisingevan
- i.v. medisingevan
- sárrøkt
- pínuviðgerð
- rehabilitering
- samstarv við aðrar starvsbólkar
- leiðslu og yvirlit

# 3. Útbúgvingarviðurskifti hjá sjúkrasystralesandi á kliniska praktikstaðnun

## 3.1 Møgulig útbúgvingartilboð til lesandi

Deild A tekur ímóti lesandi í 1., 2. og 3. lestrarhálvu, sum støðudeild og lesandi í 7. og evt. 8. lestrarhálvu.

Lærumøguleikarnir á deildini eru mangir og fjøltáttaðir, so góðir møguleikar eru fyri at fáa eina breiða vitan innan sjúkrarøkt.

Tann lesandi fær møguleika at læra móttøku av innkallaðum sjúklingum til skurðviðgerðir. Í samband við hetta er møguleiki at læra datainnsavnan, dokumentatión, at fyrireika sjúkling til skurðviðgerð, fylgja sjúklinginum til skurðgongd, evt. verða við til viðgerð, observera í viðrakning, og læra postoperativa sjúkrarøkt írokna observatiónir og fyribyrgjan av songarlegu-komplikatiónum  og mobilisering/ upptrening, í tøttum samstarvi við fysioterapeutar.

Eisini er møguleiki at læra at móttaka akuttar sjúklingar og tær observatiónir sum hartil hoyra. Í hesum sambandi er møguleiki at læra um hvussu sjúklingar og avvarandi reagera í slíkum støðum og at læra hvussu tú sjálv reagerar. At læra um kommunikatión og krepputeoriir.

Deildin gevur góðar møguleikar at læra instrumentella sjúkrarøkt, so sum at leggja og ansa bløðrukatetur, ansa dropp, geva injektiónir, sárrøkt.

Tú fær møguleika at verða við til barnaføðslar, og at læra at røkta og observera nýføðingar og barnakonur.

Møguleiki kann verða at verða við í røktini av doyggjandi, tá býst høvið at læra at hava umsorgan fyri doyggjandi og teirra avvarandi og verða við til at tryggja ein virðiligan deyða.

Miða verður ímóti at tann lesandi kann fylgja somu sjúklingum frá innleggjan til útskrivan.

## 3.2 Skipan av praktikvegleiðing

Praktikkin verður løgd til rættis út frá málunum fyri útbúgvingina, málunum fyri røktina á deildini og forteytum hjá tí einstaka lesandi.

Hvør lesandi fær tilluta tveir vegleiðarar. Deildin hevur tveir útbúnar praktik-vegleiðarar, sum báðar hava fleiri árs royndir á deildini. Onnur av hesum verður fastur vegleiðari, hin vegleiðarin gongur uppá skift. Somu vegleiðarar koma, so vítt gjørligt, at fylgja tí lesandi 3. tær fyrstu lestrarhálvurnar.

Praktikkin verður løgd til rættis frá at verða observerandi til luttakandi og síðan útinnandi.

Tann lesandi hevur ábyrgd av egnari læring, ímeðan vegleiðarin hevur ábyrgd av at skapa lærumøguleikar, við støði í lestrarætlanini.

Vegleiðingin inngongur í lærustøðurnar, og vilja vit stuðla tí lesandi til at analysera og reflektera yvir tær royndir hann fær.

Forvæntningar til tann lesandi:

- Vit vænta at tú ert opin og erlig
- at tú ert uppsøkjandi og áhugað
- at tú vísir ábyrgd fyri egnari útbúgving
- at tú ert vitandi um málini fyri útbúgvingina
- at tú ert kritisk og leggur upp til fakligt og etiskt kjak

## 3.3 Námsfrøðiliga læringin á kliniska praktikstaðnum

Við støði í teimum royndum tann lesandi hevur í ryggsekkinum, vilja vit saman koma fram til hvussu praktikkin hjá tí einstaka lesandi kann leggjast til rættis, út frá málunum fyri tíðarskeiði.

Á deildini hevur tann lesandi møguleika at læra við at hyggja at, at luttaka aktivt, at fáa undirvísing, at lesa, at reflektera ella á tann hátt vit í samstarvi halda verða best.

## 3.4 Lestrarviðurskiftini á kliniska praktikstaðnum

Vit royna at fáa tann lesandi at kenna seg sum ein lim av starvsfólkabólkinum.

Tann lesandi kemur at arbeiða mest um dagin, men hevur møguleika at leggja arbeiðstíðina ørvísi tilrættis, um hetta er til frama fyri læringina.

Lesandi sum mugu ferðast við fergu, hava møguleika at tosa um hvørjar møtitíðir passa best. Til ber eisini at fáa kamar til láns í starvsfólkabygninginum, sum liggur beint norðanfyri sjúkrahúsið.

À deildini eru góð høli har tann lesandi kann fara burturfrá at reflektera ella lesa.

Á deildini eru nógvar fakbøkur, sum tann lesandi kann gera brúk av.

Atgongd er til teldu og til internet.

## 3.5 Væntanirnar hjá kliniska praktikstaðnum til lestrarfyrireikingar hjá lesandi

Av tí at tað eru sjúklingar við so nógvum og ymiskum innleggjingarorsøkum á deild A, er ringt at siga hvussu ein kann fyrireika seg til praktikkina. Tó kann viðmælast at lesa um pre- og post operativa sjúkrarøkt, um observatiónir í samband við akut abdomen, um frakturar, um reinføri og smittuvegir, um røkt av venflon og drop.

# 4. Annað

## 4.1 Tænastubúni

Tænastubúnin, kittil ella buksudrakt, verður latin til láns frá Sjúkrahúsinum, og skal latast aftur tá praktiktíðin er av.

Búnin skal bert nýtast í arbeiðstíðini og inni á sjúkrahúsøkinum, undantikið er yvirflytingar av sjúklingum.

Tað er ikki loyvt at nýta privat klæði uttaná búnan.

Fyri at fyribyrgja smittuspjaðing skal búnin skiftast dagliga, og um hann verður dálkaður.

Plastikfyriklæði verður brúkt at verja búnan, um vandi er fyri dálking.

Harafturat er av størsta týdningi :

- at hava gott hondreinføri
- at binda langt hár upp
- at hava stuttar reinar negl
- ikki at bera ringar, armbond, armbandsur,neglalakk ella líknandi
- at hava skógvar sum kunnu vaskast ella reinsast

Heilsan starvsfólkið

Juni 2003 MH/MJ/MF